Álit

í

løgtingsmáli nr. 4/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík (Hækka studningslánið og áseta stuðul til innbúgv og útbúnað)

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana, hevur lagt málið fram tann 3. august 2022, og eftir 1. viðgerð tann 4. august 2022 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 4. august 2022.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í uttanríks- og mentamálum, Jenis av Rana, saman við Poul Geert Hansen, aðalstjóra (umvegis telefon).

Landsstýrismaðurin hevur upplýst fyri nevndini, at talan er um eitt bindandi tilboð, sum ikki kemur at hava nakran meirkostnað við sær fyri landskassan.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 4. august 2022

Erhard Joensen formaður	Bjarni Hammer	Jørgen Niclasen
Elsebeth M. Gunnleygsdóttur	Bill Justinussen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	